# BRÚÐARVÍSUTÁTTUR

Hendan táttin yrkti eg til fólkið í Fótatraðk eftir ein heilt serligan og ørkymlandi aðalfund hin 17.02.2013

**Lag og niðurlag:**
Brúðarvísu uppskot B

**Yrkjari:**
Tummas

1. Í Februar hjá Fótatraðk vit fóru øll á fund.
Vit møttu øll for seint tað uttan nakra grund.
Sum vanligt er í Føroyum at koma alt ov seint,
vit eru øll ófólkalig, og hógv vit hava gloymt.

**Niðurlag:**
*Kveikjandi kertur, kærleikans stund,*
*fjálga, alreyða rósulund,*
*reyðgylta glæma, tá sól fer í kav,*
*brennandi kenslur, sum brúsandi hav.*

2. Tá vit høvdu bíðað har í trý korter,
Birita hon byrjar fundin við manér.
Sum forkvinna hon talar og meinar mangt og hvat.
Á facebook kvøldið fyri Mirjam hon græt.

3. Sum fundarsiður í Fótatraðki er,
fólkið tað ýlur og einki annað ger.
Jan Bærentsen er ringast og peikar runt umkring
Kun Rasmus sidder stille, og siger ingenting.

4. Ólavur biður tey øll halda kjaft
Nú aðalfundurin treður í kraft
Tí nú skal tað fundast um brúðarvísur,
Hann eftir Maibritt og Anniku físur.

5. So trínur Brandur inn um fundargátt,
í gjár hann fekk á Skarv eitt eyga blátt.
Jógvan Páll hann hugsaði fyri sjálvum sær,
hví skilir ongin roknskapin hjá mær.

6. Har sótu trýggjar konur til fundin fyrstu ferð.
Tær øtaðust og stardu, åh den skøra verð.
Sum rytur í bergi, í junglu bavianir,
sleingja tey um borðið vanvittigar vokalir.

7. Tað varð ei góður endi til hetta fundarkvøld.
Tey brúðarvísuhjørtu vórðu ísakøld.
Brúðarvísur allar koyrdu vit í skrell,
eg kundi greitt frá meira, men nú man vera well!